# Gleða seg til vikuskiftið

**Hóast fullteknað er til “Aftur í 60-árini” leygarkvøldið, so eru enn atgongumerki til tiltakið fríggjakvøldið**

AFTURVENDANDI TILTAK
*Jan Müller*

Hóast hetta er 14. árið á rað, at hondbóltsfelagið Neistin skipar fyri víðagitna og afturvendandi tiltakinum “Aftur í 60-árini”, tykist áhugin á ongan hátt at verða minkandi. Heldur tvørturímóti. Og fyri at nøkta henda stóra tørv og gevum øllum teimum, sum vilja vera við til at fáa lív í aftur gomul dansiminni, møguleika at uppliva 60-uni umaftur, skipar Neistin eisini í ár fyri einum eyka tiltaki fíggjakvøld.

Frá byrjan var bert talan um hetta eina kvøldið, leygarkvøld. Tað er jú tá fólk hava frí og kunnu stákast og gera seg út til kvøldið, men so stórur hevur gravgangurin verið eftir atgongumerkjum til leygarkvøldið 21. apríl, at hundraðtals fólk hava staðið á “bíðilista”. Og tað er henda bíðilista, sum “Aftur í 60-árini” fríggjakvøld skal rudda upp í. Meðan tey 950 atgongumerkini til leygarkvøldið vórðu seld mest sum alt fyri eitt, er enn møguleiki at fáa pláss til tiltakið fríggjakvøldið 20. apríl. Fyrst í vikuni vóru eini 500 atgongumerki seld. So møguleiki skuldi verið fyri at fingið pláss í annaðkvøld.


*Tey av Kamarinum verða aftur á palli í høllini á Nabb fríggjakvøldið og leygarkvøldið*

## Stóran týdning

Aftur í 60-árini er vorðið eitt av teimum best vitjaðu árligu og afturvendandi tiltøkunum av sínum slag her á landi. Tiltakið líkasum hevur fingið sín egna identitet – er vorðið til eina hending, sum nærum 2000 fólk kring alt Føroya land gleða seg til og seta í kalendaran sum eitt av hæddarpunktunum í árinum. Tað hevur fingið ein sosialan umframt ein tónlistarligan týdning. Bindiklubbar, vinfólk o.o. seta av allan leygardagin 21. apríl at vera saman til gaman og álvara, áðrenn leiðin gongur víðari niðan á Nabb. Hitað verður bæði væl og virðiliga upp til at fara í høllina at hitta so mong onnur kend andlit og til at hoyra tann “gamla” nærum kensluborna tónleikin.

Tað er ikki ov nógv sagt, at Vagnur Michelsen var undangongumaðurin, tá farið varð undir at skipa fyri tónleikatiltakinum “Aftur í 60-árini” fyri næstan 15 árum síðani. Hóast mong onnur í Neistanum eiga sín stóra part í arbeiðinum, skerst ikki burtur, at Vagnur er tann einstaklingurin, sum einamest eigur lívið í tiltakinum. Sjálvur er hann fegin um, at hetta hevur kunnað givið Neistanum fleiri pengar at arbeiða við, nú felagið ger eitt so stórt og slóðbrótandi ungdómsarbeiði. Men tað eru ikki bert pengarnir til hetta arbeiðið, sum hava nógv at siga. Fyri Vagn hevur tað eisini stóran týdning at kunna savna so mong fólk úr einum ávísum aldursbólki úr øllum landinum at hoyra og dansa til tann tónleikin, sum var frammi, tá hesi fólkini vóru ung fyri meira enn 30 árum síðani. Tað er so eisini tónleikur, sum verður spældur av nógvum nýggjum bólkum.

## Fólkamentan

Eisini fyri tónleikararnar sjálvar er hetta ein stór uppliving, so samanumtikið má tiltakið sigast at vera gott uppá nógvar mátar. Eisini má sigast, at slíkt tiltak hevur fingið ikki sørt av einum mentanarligum dámi eisini. Nakað við fólkamentan tá hon er best. Tað hevur so eisini eydnast stigtakararunum ár eftir ár at fáa fleiri av teimum heilt kendu bólkunum frá 60-unum at spæla og syngja. Onkur bólkur er entá vorðin endurreistur við hesum tiltaki. Best kend eru Faroe Boys og Goggan. Men har hava so eisini nógvir aðrir kendir bólkar spælt og spæla enn, eitt nú Tey av Kamarinum, sum í ár – saman við Thunderbirds – verða harði ella kanska bleyti (kensluborni) kjarnin í tiltakinum. Tey av Kamarinum vóru við í høllini fyri meira enn 10 árum síðani. Nú verða tey so aftur á palli. Tónleikabólkurin hevur spælt út í eitt síðani 1955 men við ymsum manningum. Leygarkvøldið er manningin henda: Nicolina Jacobsen, Ingolf Jakobsen, Áslakkur Jakobsen, Eyðbjørn Jakobsen, Jákup Jakobsen, Árni Andreasen og Jóan Petur Andreassen. Tey av Kamarinum skulu eisini ein túr til Danmarkar at spæla í ár.

Umframt Thunderbirds, sum altíð setir sín serstaka dám á slíkt tiltak, er eisini Twilight við. Bólkurin hevur øll árini staðið fyri tí tekniska partinum av tiltakinum og eigur sum so lívið í tí.




**VW PASSAT TDI DIESEL**
110 HK, árg 01/98, 39.993 km – sera væl hildin. Útgerð: Airbags, ABS, sentrallás, servostýring, el-rútar framman, el-speglstýring, radio v/banduppptakara. Galvaniseraður. Vetrardekk fylgja við.
Prísuppskot kr 180.000

Tel 311861



**VW PASSAT**
Árg 2000, km 43.000 kr 245.000

Tel 212171-314968









# Neyðugt við umfatandi broytingum


*Í gjár varð álitið hjá útoyggjanevndini handað Anfinni Kallsberg, løgmanni. Olga Biskopstø hevur verið formaður og samskipari hjá nevndini.*

Mynd: Jens Kristian Vang

**Útoyggjarnar og bygdirnar eru avskornar frá vøkstrinum, sum tær sjálvar løgdu lunnar undir fyri skjótt 200 árum síðani. Skal gongdin vendast, er neyðugt at fremja munandi broytingar á fleiri grundleggjandi økjum, sigur útoyggjanevndin í áliti, sum nú er handað løgmanni**

ÚTOYGGJAR
*Eyðun Klakstein*

Tað ber til at steðga fráflytingini frá útoyggjunum, men tað krevur umfatandi broytingar á fleiri grundleggjandi økjum.

Hetta er niðurstøðan hjá útoyggjanevndini, sum í gjár handaði løgmanni álitið, sum nevndin hevur arbeitt við seinasta árið.

– Skal málið um at steðga fráflytingini frá útoyggjum náast, mugu fólk og politikarar arbeiða í felag fyri at røkka málinum, sigur útoyggjanevndin í álitinum.

Útoyggjanevndin kemur við ítøkiligum uppskotum um, hvat kann gerast fyri at venda skeivu gongdini hjá útoyggjunum, og talan er uppskot av ymsum slagi - bæði vinnuligum, mentanarligum og heilsuligum.

## Ikki raðfestar nóg høgt

Útoyggjanevndin staðfestir í sínum áliti, at útoyggjarnar hava ikki somu umstøður sum aðrir partar av landinum.

Útoyggjarnar høvdu ein avgerandi leiklut í menningini av Føroyum frá einum steinrunnum böndasamfelagi til eitt ríkt, framkomið vinnu- og vitanarsamfelag.

– Men prísin fyri ta skjótu og umfatandi broytingina av samfelagnum hava bygdirnar og útoyggjarnar í Føroyum goldið. Tær eru avskornar frá at fáa lut í vøkstrinum, sum tær sjálvar løgdu lunnar undir fyri skjótt 200 árum síðani, sigur útoyggjanevndin í áliti sínum.

– Politiskt hava útoyggjarnar ikki verið raðfestar nóg høgt. Tey tiltøk, ið eru gjørd, hava oftast verið støk tiltøk heldur enn partur av miðvísum og samskipaðum útjaðarapolitikki.

Útoyggjarnar eru í dag á sama stigi sum fyri 200 árum síðani, tá tað ræður um fólkatalið, men fyri 200 árum síðani var bygdasamfelagið ein væl skipað fíggjarlig, sosial og mentanarlig eind, ið megnaði at endurnýggja seg sjálva. Í dag eru tað almennir stovnar á meginøkinum og kommunurnar, sum skulu tryggja eitt hóskandi tænastustøði, men tað hevur ikki eydnast til fulnar, sigur útoyggjanevndin.

– At tað hevur eydnast at halda lív í smáplássunum er teirra innaru styrki at takka.

## Stórar íløgur í samferðslu

Útoyggjanevndin vísir á fleiri øki, har broytingar eru neyðugar, skulu umstøðurnar hjá útoyggjunum betrast. Samferðslan hevur stóran týdning, og her er alneyðugt við broytingum, tá talan eru um ferðasambandið til og frá oyggjunum.

– Skipini eru ikki tíðarhóskandi, og tað er ov langt millum túrarnar. Somuleiðis verður hildið, at tyrlan flýgur ov fáar túrar. Farmaflutningurin er heldur ikki nøktandi á flestu farleiðum, skrivar útoyggjanevndin í áliti sínum.

Tá talan er um vegir, tunnlar og lendingar eru ábøtur gjørdar og útbyggingar framdar á flestu oyggjum tey seinnu árini. Hetta hevur gjørt, at nógvastaðni eru góðir vegir í og millum bygdir.

– Men enn er langt eftir á mál. Skulu vegakervið, lendingar og tunlar kunna nøkta tørvin á einum øktum, útbygdum og nýtímansgjørdum ferðasambandi, er neyðugt at styrkja hendan partin samsvarandi, sigur útoyggjanevndin.

## Ítróttarhøll á hvørjari smáoyggj

Bert 14 prosent av úrtøkuni hjá íbúgvum á útoyggj stava frá jarðarbrúki. Hetta kemst av, at tilfeingið á teimum ymsu plássunum verður ikki nýtt til fulnar, heldur útoyggjanevndin.

– Orsøkirnar eru bæði at finna í umstøðunum fyri jarðarbrúki á útoyggj, í vantandi landbúnaðarlóggávu og ikki minst í avskeplaðum jarðarviðurskiftum. Í løtuni stendur valið ímillum at fjálga um eitt frítíðarítriv og eina búseting.

Útoyggjanevndin leggur tó dent á, at møguleiki skal verða fyri at menna aðrar vinnugreinar enn landbúnað. Skulu hjún flyta til smáu oyggjarnar, má dentur leggjast á, at arbeiðspláss eisini eru til konufólkini.

– Smáídnaður, smoltaling, KT-vinnutiltøk og fjararbeiði eru vinnur, ið kunnu setast á stovn á útoyggj, heldur útoyggjanevndin.

Neyðugt er eisini við mentanarligum tiltøkum, og tí leggur útoyggjanevndin upp til, at lítil ítróttarhøll, bygdarhús og skipað barna- og ungdómstiltøk skulu vera í øllum teimum smáu oyggjunum.

## Betri heilsutænastu

Á heilsuøkinum eru stórir veikleikar í verandi skipan. Heilsutænastan í Føroyum er ikki nóg væl skipað, og allir borgarar fáa ikki somu tænastu. Útoyggjanevndin heldur, at umráðandi er at samskipa allar heilsutænastur innan nýtmótans karmar, til dømis á einum heilsudepli.

– Útoyggjaborgarin má fáa eins góða tænastu sum tey á meginøkinum. Harvið upplivir hann ikki, at vælferðarsamfelagið bara er fyri tey, sum flyta av oynni, sigur útoyggjanevndin.

Nevndin mælir til, at ein stovnur ella eitt starv sum útoyggjaumboð verður sett á stovn. Uppgávan hjá umboðnum skal verða at virka fyri, at politiskir málsetningar um útoyggjamenning verða útintir í verki.

## Arbeitt í eitt ár

NEVNDIN
*Eyðun Klakstein*

Tað var í apríl mánaði í fjør, at løgmaður setti eina nevnd at lýsa og viðgera útoyggjaviðurskifti.

Endamálið við arbeiðnum skuldi verða, at politisku myndugleikarnir skuldu hava eitt grundarlag at taka støðu út frá, so útoyggjarnar og smáplássini ikki doyggja út.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini hevur verið at lýsa umstøðurnar á útoyggjum, at gera ítøkilig menningaruppskot og koma við uppskoti til útoyggjapolitikk.

Oyggjarnar, sum hava verið umfataðar av arbeiðnum hjá nevndini, hava verið Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hestur, Koltur, Skúvoy, Lítla Dímun, Nólsoy og so Gásadalur.

Olga Biskopstø í Klaksvík hevur verið formaður í nevndini og samskipari av arbeiðnum, og umframt hana hava umboð fyri útoyggjarnar og fyri løgmansskrivstovuna sitið í nevndini.

Álitið, sum nú er latið løgmanni, er fleiri enn 200 síður og verður handað eitt ár eftir, at nevndin varð sett at gera arbeiðið.

## Kjak um orðið útoyggj

ÚTOYGGJ?
*Eyðun Klakstein*

– Nú verður bara tosað um útoyggjar, nøvnini á útoyggjunum verða nærum ikkin nevnd longur, og vit eru ikki longdur verd tað sama sum onnur, tí vit búgva á »útoyggj«. Her er okkurt galið.

Soleiðis segði onkur á einum av fundunum hjá útoyggjanevndini. Nevndin hevur eisini viðgjørt spurningin, um tað er rætt at brúka orðið útoyggj sum felagsheiti fyri tær ymsu smáu oyggjarnar.

Um hugt verður eftir landafrøðiliga týdninginum eru allar oyggjarnar, sum nevndin hevur arbeitt við, ikki útoyggjar sum so, men í orðinum liggur eisini ein annar týdningur, sum kann samanfastast soleiðis: Oyggjar, ið ikki hava nøktandi ferðasamband og ikki hava somu menningarmøguleikar sum meginlandið.

Eitt uppskot í nevndini var, at orðið smáoyggjar varð brúkt ístaðinfyri útoyggjar. Meirilutin av útoyggjanevndini helt tó, at heitið útoyggj framhaldandi skuldi brúkast, meðan minni parturin ynskti at brúka hitt heitið.

Tí varð niðurstøðan av kjakinum, at útoyggjarnar framyvir eisini skuldu kallast útoyggjar.